## EG MEINI TAÐ

# Serfrøðingar ella ikki ?



*Durita Holm skrivar*

Anders Fogh Rasmussen segði í nýggjárstalu síni millum annað, at hann vildi serfrøðingaveldinum til lívs, tí at meinigi maðurin er líka væl skikkaður støðutakari sum serfrøðingurin. Harafturat meinti hann, at serfrøðingatyraniið máaði støðið undan fólkaræðinum.

Kanska Rasmussen hevur grein í sínum máli, men tað sum hann gloymur er, at um tú vil taka nakað burtur sum er vorðið stovnsfest, so má tú í øllum førum hugsa um, hvørjar konsekvensir tað eventuelt hevur og hvussu teir í sofall skulu handfarast.

Tað kann kanska tykjast eitt sindur løgið, men eg fari at seta Rasmussensa meining í samband við eina, fyri meg, skelkandi barrvitjan eitt leygarkvøld herfyri.

Ein føroyskur vinmaður og eg vóru altso á eini øgiligari coolari barr, har talið av teimum sokallaðu væleydnaðu var høgt - við øðrum orðum tey sum arbeiða í øllum hesum nýggju coolu vinnunum: Kt-, reklamu-, konsulentvinnuni o.s.fr.. Hendan barrin var ikki bara cool, hon var eisini køld. Fólkini tóktust ikki sum vóru tey gjørd úr kjøti og blóði, tey tóktust ikki at hava puls og temperatur, heldur tóktust tey vera úr rustfríum stáli og glasi - køld, hørð og mekanisk. Hvat var hetta fyri nakað? Jú, hetta vóru tey væleydnaðu, tey fleksiblu, effektivu og kreativu við 70 tímars arbeiðsviku, designaraklæðum og Audi í garasjuni.

Tað tykist sum, at krøvini tað postmodernaða býarsamfelagið setur sínum borgarum verða meira og meira menniskjafíggindalig.

Samfelagið er vorðið so komplekst og tey harav fylgjandi krøvini um fleksibilitet og effektivitet hava ein høgan prís. Við sviðusoð verða nevniliga persónligur tryggleiki, og hin grundleggjandi, djúpa samleikakenslan. Tey postmodernaðu býarkrøvini føra altso til kaldar ego-tripparar, sum alt ov ofta vakna við kaldan dreym og bara gráta og gráta uttan at vita hví. Tey síggja bara meiningsloysi og einasta troyst eru eydnupillarar. Hetta er ikki tvætl sum eg finni uppá. Sjálv kenni eg heili tvey fólk sum vaknaðu við kaldan dreym. Harafturat kenni eg tvey onnur sum selja skeið til fyritøkur, og hvørji skeið? Jú, annar selur motivatión og hin humor. - Hevur nakar hoyrt so skapt? Eg meini, kann slíkt keypast?

Er tað ikki eitt tekin uppá, at okkurt er ravruskandi galið, tá motivatión og humor er nakað sum má lærast frá skeiðhaldarum?

Hvat hevur so hetta við Rasmussen og serfrøðingaveldið at gera - jú rættuliga nógv. Rasmussen sigur, at meinigi maðurin er eins væl skikkaður støðutakari sum serfrøðingurin. Her hugsi eg, at Rasmussen velur at gloyma, hvussu komplekst nútíðarsamfelagi er vorðið, og einki týður uppá, at tað verður einklari, heldur hinvegin. Kunningarstreymurin er alsamt økjandi og orsakasambondini verða alt meira torrgreidd og tokut.

Eg vóni, at Rasmussen, tá ið hann t.d. sker 48 milliónir av játtanini til Roskilde universitets center um 5 ár, hevur hugsað um, at í okkara sekulariseraða lívshátti, har trúgvin ikki longur vísir vegin, men har meining og virðir eru alsamt meira flótandi og upp til einstaklingin at finna, so er tað kanska tørvur á fólki við kunnleika til at pilka kompleksitetin sundur í smærri bitar og greiða frá samanhangum sum kunnu gera tilveruna minni torskilda og veita eitt kvalifiserað grundarlag til at røkja fólkaræðisskylduna.

Er Rasmussen greiður yvir, at eitt av eyðkennunum við nútíðarsamfelagnum er ring tíð, og at tann mest grunnleggjandi fortreytin fyri hugsunarsemi júst er tíð, góð tíð. Er hann greiður yvir, at samfelagið er í vanda fyri at missa tað hugsunarsemið, sum kanska er meir tiltrongt nú enn nakrantíð.

Hetta eru álvarsligir trupulleikar og í Noregi hevur fremmandagerðin verið nóg umfatandi til, at stjørnin stovnaði eina virðisnevnd. Hon skuldi finna felagsvirðir sum tjóðin kundi savnast um og fólkð kundi identifisera seg við.

Tað sum føroyski vinmaðurin og eg blivu samd um á barrini hitt leygarkvøldið, var, at tann jarðbundna føroyska barlastin ikki var so galin at hava við sær út í tað virðisflótandi, kompleksu og køldu býarjungluna.

**Vikuskifti**

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro



*Betlehem*

*Mynd: Reuters*

# Dagsins Betlehem - ein náðileysur heimur

Sonurin Mohammad varð avrættaður, tí aðrir palestinar løgdu hann undir at hava hjálpt ísraelsmonnum. Nú hava øll í húsinum mist arbeiðið, og børnini verða happað burtur úr skúlanum

**BAKGRUND**
*Árni Joensen*

- Hann var ósekur, sigur Huda Nawawra. Næstseinasta hósdag varð sonur hennara avrættaður - av øðrum palestinum. Teir skutu hann í høvdið og bringuna, áðrenn teir drógu hann ígjøgnum gøturnar í Bethehem. Líkið av tí 29 ára gamla Mohammad Defala Nawawra skuldi vísa fólkinum á Vestara Áarbakka, hvørja revsing svíkjarar fáa.

Men hetta var bara tann sjónligi parturin av revsingini. Móður hansara, faðirin og teir elstu brøðurnir hava nú mist arbeiðið, sum tey høvdu, og móðurin ivast í, um nakar fer at gifta seg við teimum fimm systrunum hjá Mohammad. Tí her er tað eingin, sum giftir seg við einum svíkjara, og í eygum palestina var tað ikki einans Mohammad, sum var svíkjari, men alt húskið.

- Alt húskið er lagt í oyði. Í skúlanum happa teir størru dreingirnir tann yngsta son okkara og siga, at bróður hansara var svíkjari. Teir siga, at hann varð avrættaður og tveittur út á gøtuna. Genturnar, sum plagdu at spæla við døtur okkara, spæla ikki við tær longur, men gera gjøldur burtur úr teimum, sigur Huda Nawawra.

Sonur hennara er ikki tann einasti. Í somu viku, sum Mohammad doyði, vórðu seks aðrir palestinar avrættaðir sum svíkjarar. Teir flestu vórðu avrættaðir, tí onkur hevði illgruna um, at teir vóru svíkjarar, aðrir komu fyri ein dómstól, men eingin teirra fekk høvi at verja seg.

### Ongan gravstað

Tí her í teimum palestinsku gøtunum er tað einki, sum eitur at kæra ein dóm. Mohammad Defala Nawawra bleiv dømdur, tí aðrir høvdu illgruna um, at hann hevði latið ísraelsmonnum upplýsingar, sum høvdu við sær, at ísraelsmenn skutu ein hernaðarligan palestinskan leiðara. Hann segði seg vera ósekan, og móðurin sigur, at hann hevði útvegað sær prógv fyri, at hann var ósekur.

Men hann fekk ongan møguleika at verja seg.

- Eg eri ósekur! Eg eri ósekur! Drepið meg ikki! Men teir vildu ikki lurta eftir honum og tóku hann til staðið, har ísraelsmenninir skutu leiðaran. Har skutu teir so Mohammad og tveittu líkið út á gøtuna. Eingin vildi siga mær, hvar líkið av soni mínum var. Tá eg endiliga fann hann, skundaði eg mær á eitt sjúkrahús við honum, men heldur ikki har fekk hann nakra virðiliga viðferð, sigur tann syrgjandi móðurin.

Teir átrúnaðarligu leiðararnir vildu heldur ikki geva honum ein gravstað. Og í dag veit Huda ikki, hvar líkið av soninum er.

- Vit bóðu guvernørin hjálpa okkum at finna ein gravstað til Mohammad. Hann lovaði at hjálpa okkum, og hann sigur, at teir hava jarðað hann á einum loyniligum staði. Men vit fáa ikki at vita, hvar tað er, sigur Huda Nawawra.

### Torir ikki út

Sjálv situr hon í stovuni og hugsar um tað, sum er hent. Á vegginum hanga myndir av tí deyða soninum. Hini átta í húsinum eru eisini inni og sita og stara niður í gólvið. Bara ein tvey ára gomul smágenta spælir á gólvinum. Enn veit hon ikki, at lagna hennara er avgjørd, at hon longu er fordømd.

Síðani Mohammad varð avrættaður, hevur móðurin bara verið uttan fyri dyrnar einaferð. Tað var til eitt minningarhald til minnis sum sonin. Eingin annar kom.

- Eg tori ikki út. Eg eri bangin fyri at møta øðrum, og hvat tey fara at siga. So eg siti heldur við hús, sigur hon.

Hetta er ein náðileysur heimur. Í býnum Ramallah varð ein maður skotin og líkið hongt í ein pela á torginum mitt í býnum. Í Betlehem ætlaðu nakrir menn at gera tað sama við ein mann, sum eisini varð lagdur undir svik, men løgreglan forðaði tí.

Í tí lítla húsinum í Betlehem halda tey seg ikki hava hjálpt ísraelsmonnum, men lítil uggi er í sannføringini. Tann einasti glottin var, so løgið tað ljóðar, tá faðirin misti arbeiðið:

- Tey søgdu, at tey høvdu ikki brúk fyri honum í prýðishandlinum longur, tí tað eru so fá fólk, sum koma í handilin nú. Men soleiðis hevur tað verið so leingi, og vit vita, at hann varð uppsagdur orsakað av hasum um Mohammad. Men tað var vakurt av teimum kortini at siga tað á ein annan hátt, sigur Huda Nawawra.



# Ein dagur sum løgreglumaður

Ein løgreglumaður veit ongantíð, hvussu arbeiðsdagurin kemur at ganga. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og harafturat veit eingin, hvat kann henda. Ein løgreglumaður kann vera kallaður út til hvat sum helst. Sosialurin hevur fylgt einari vakt á løgreglustøðini í Tórshavn í ein dag

**ARBEIÐSDAGUR**
*Kaj Joensen*

Í amerikonskum filmum fær løgreglan ofta skotið í skógvarnar, at teir ikki duga annað enn at fylla seg við doughnuts. Vit vita sjálvandi, at tað ikki er sannleikin, men vit vita ikki, hvussu ein dagur hjá einum løgreglumanni í Føroyum kann ganga. Undirritaði slapp at fylgja løgregluni, og valdi at fylgja við, hvussu tað kann gangast eini vakt, ein vanligan hósdag.

Vaktin byrjar kl. 7 á morgni, og møtast skal rættstundis. Tá ið eg komi á støðina, eru løgreglumenninir, sum eg skal fylgja, longu klárir og onkur longu farin út at keypa morgunmat. Á vaktini hendan morgunin eru, Tóri Midjorð, Eyðun Dalsgaard, og Jákup Martin Joensen, og Rani Wardum er vakthavandi. Hendan dagin er teirra uppgáva at vera gøtuløgregla. Annars skifta teir ímillum ferðsluløgregluna og ordens.

Men áðrenn morgunmaturin er klárur, skal dagsins fyrsta uppgáva avgreiðast. Vaktin í gjárkvøldið handtók ein mann, ið gekk fullur í gøtunum og gjørdi heldur nógv um seg. Nú hevur hann sovið rúsin av sær og kann sleppa útaftur. Jákup Martin og Tóri, ið lata mannin leysan aftur, greiða frá, at hann tíverri er ein gamal kenningur hjá løgregluni. Ein av teimum umleið 10 persónunum, ið alt ov ofta eru inni á støðini og sova rúsin av, og eru teir ikki á støðini, gista teir antin úti á gøtuni ella á Herberginum hjá Frelsunarherinum.



*- Eitt tað ringasta eg síggi er, tá ið foreldrini ikki spenna børnini hjá sær føst, sigur Jákup Martin*

*Mynd: Kaj Joensen*

### Friðarligt

Tá maðurin er latin úr varðhaldinum, er morgunmaturin klárur, men gleðin er stokkut. Sera hált er hendan morgunin og vakthavandi boðar frá, at eitt ferðsluóhapp er inni á Sundi. Jákup Martin býður seg fram at koyra inn á Sund at fáa greiðu á, hvat er hent. Tíbetur hevur óhappið ikki nógv uppá seg, bilarnir hava fingið lítlan skaða. So skjótt er at avgreiða støðuna. Tað sum løgreglan ger á staðnum, er at fáa eina frágreiðing frá báðum pørtum um, hvussu óhappið er hent og meta um bilarnir eru í nóg góðum standi at koyra víðari. Eftir hvørt útkall skal ein frágreiðing skrivast og hetta er einki undantak. So er tað upp til tryggingina at meta um, hvør hevur feilin.

Sjálvt um tað ber brá av at tað fer at vera úr at gera, so er morgunin sera friðaligur. Eingin ringir inn og meldar nakað. Tí er neyðugt at gera nakað av uppsøkjandi løgregluarbeiði.

Eg fari við Eyðuni og Jákup Martini til Kollafjaðrar at gera ferðkanningar, men til alla lukku fyri teir, ið koyra ov skjótt hendan dagin, liggur illa fyri at fanga ferðsyndararnar. Lasarin er í brúki aðrastaðni í landinum. So teir noyðast at nýta police pilotin. Men ov nógvur kavi ger, at ikki ber til at síggja merkini fram við vegnum, sum løgreglan er merkt upp. Men hóast tað sleppa bilførararnir ikki undan at verða kannaðir. Vit fara ístaðin aftur til Havnar at gera grein 13 kanningar.

### Bilarnir í góðum standi

Í meðan vit koyra ber til at fáa eitt prát við løgreglumenninar. Eg koyri mest saman við Jákup Martini og Eyðuni, ið eru í yngra endanum á løgreglustøðini. Um ein skal blíva løgreglumaður, skal ein niður til Danmarkar í skúla í 3 ár. Tíðin niðri er tann besta vit hava havt, siga báðir við ein munn. Báðir trívast væl í arbeiðinum, og sjálvt um viðurskiftini eru smá í Føroyum, so eru teir enn slopnir undan at hava við fólk at gera, sum teir eru í familju við.

- Eg havi tikið onkran fyri rúsdrekkakoyring, sum eg kenni. Men tað kann eg ikki taka mær av, eg geri bara mítt arbeiði, vísi gott andlit úteftir og eri eg sjálvur, sigur Jákup Martin.

- Eingin dagur er líka, og ein veit ongantíð, hvat ein verður sendur út til. Tað kann verða alt frá húsófriði til hundar, ið ganga leysir.

Prátið kemur eisini inn bilarnar. Kanningin hendan dagin, Sosialurin er við, vísir, at bilarnir eru í góðum standi. Bara tveir av fjøruti bilum fáa bót. Og Eyðun kann taka undir við, at bilførararnir koyra í góðum bilum. Tað man koma av, at so nógvir nýggir bilar eru á vegunum nú. Tað, ið fólk fáa mest bót fyri, er gloymd koyrikort og at koyra uttan at sita í trygdarbelti.

At løgreglan gongur høgt uppí, at hetta verður fylgt, serliga tá ið børn eru við, er sjón fyri søgn. Vit steðga tveimum bilum sum vit møta, og venda við aftur, har løgreglumenninir leggja til merkis, at smábørnini ikki eru spent føst.

- Tað er eitt tað ringasta eg síggi, tá ið foreldrini ikki spenna børnini hjá sær føst, sigur Jákup Martin.

### Sami maður tikin aftur

Umframt óhappið á Sundi og grein 13 kanningina, eru onkrar smáar uppgávur, onkur nummarpláta skal takast, og eisini stevning fyri rættin skal berast út til rætta viðkomandi.

Meðan vit koyra niðri í miðbýnum, koma vit framvið okkara kennig frá morgunstundini av. Hann sær út til at hava fingið ivaleyst at drekka aftur, so vit steðga at práta við hann. Tað vísir seg skjótt at so er, hann stendur og stiðjar seg upp ímóti einum garði. Annar av løgreglumonnunum fer út at tosa við hann, og ger av, at tað man vera best at taka hann í bilin. Fyrst er ætlanin at taka mannin við á støðina, men tað er hann ikki so glaður fyri. Roynt verður so at fáa hann inn á Herbergið, men av tí, at maðurin kann gera í so nógv til tíðir, umframt at bert ein kona er á Herberginum við fleiri fólkum, sleppur hann ikki inn. Tískil eru einastu ráðini at taka mannin við á støðina at sova rúsin av sær. Maðurin, sum hevur gramt seg um, at hann ikki fær luft, verður spillfrískur og ressast við, tá hann hoyrir at hann skal á støðina. Hann kemur so væl fyri seg, at løgreglumenninir gevu honum ein møguleika at vísa at hann kann ganga sjálvur. Ta royndina klárar hann við glans. Og sleppur so at halda leiðina fram. Onkur vil kanska halda, at tað er óðmannaverk at lata hann sleppa, men veruleikin er, at løgreglan kennir hesar menninar til lítar.

Móti endanum av degnum verður knappliga nógv at gera. Júst sum vit hava sett omanfyri nevnda mann av, møta vit einum bilførara, ið Eyðun og Jákup Martin fáa illgruna um koyrir við kenning. Hann verður steðgaður og illgrunin vísir seg at vera væl grundaður. Alkoholmetrið vísir eina promillu uppá 1,23. So eingin ivi er um, at omanfyri loyvda hámarkið uppá 0,5, er brotið. Maður verður handtikin og lækni boðsendur at taka bloyðroynd av manninum fyri at endaliga at staðfesta støðuna.

Í meðan Jákup Martin avhoyrir viðkomandi, ringir ein bilførari, ið sigur seg koyra aftan fyri ein, har alt ikki ruggar rætt. Allarhelst er talan eisini um rúsdrekkakoyring. Eyðun er skjótur avstað, men tíverri eydnast tað ikki at finna bilin aftur.

- Tað er ógvuliga sjáldsamt at taka tveir fyri rúsdrekkakoyring ein hósdag, siga teir. Hesuferð var tað kunnleiki til viðkomandi, ið førdi við sær illgrunan.

Vaktin skal upprunaliga verða liðug klokkan trý, men Jákup Martin og Eyðun noyðast at avgreiða sín setning, áðrenn teir sleppa til hús. Frágreiðing skal skrivast, so tað verður eitt sindur av yvirtíð.